

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 12 - 2011

# Nýtt oljufund í Norðsjónum

Felagið BG Norge AS hevur funnið olju vestan fyri Knarr-økið, sum er norðarlaga í Norðsjínum. Tað er bretska felagið BG Group, sum eigur BG Norge AS. Felagið sigur í fráboðan, at sambært fyribilsmetingum eru millum 1,6 og 4,0 milliónir rúmmetrar av olju í brunninum, so talan er um eitt lutfalsliga lítið fund. BG Norge sigur, at felagið umhugsar at brúka eitt framleiðsluskip til tað nýggja fundið, men fyrst skal felagið taka støðu til, at útbyggingin yvirhøvur skal fremjast í verki. Norska Stórtingið samtykti í summar at góðkenna eina útbyggingarætlan fyri Knarr-økið. Tá metti Oljustýrið, at millum 8 og 14 milliónir rúmmetrar av olju eru í økinum.